# Trupult at fáa serliga avtalu um skattalætta

**– Samgongan hevur longu avtalað at lækka skattin.Og sum støðan er, verður ómetaliga trupult at fáa eina serliga avtalu við fakfeløgini fyri at fáa lønarkrøvini at linka, sigur løgmaður**

KOSTNAÐARSTØÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Landskassin hevur sera stórar trupulleikar, so afturat tí skattalætta, sum samgongan hevur bundið seg til, verður tað ringt at gera nakra serliga avtalu við arbeiðarafeløgini um at lækka skattir og avgjøld, sigur løgmaður*

– Vit hava longu bundið okkum til at lække skattin. So vit meta avgjørt, at vit hava nógv at tosa við fakfeløgini um.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tekur fegin ímóti arbeiðarafeløgunum og arbeiðsgevarunum, biðja t ey um fund við Landsstýrið at tosa um kostnaðarstøðið í Føroyum.

Sum vit nevndu í Sosialinum í gjár, hava arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevarafelagið tosað saman um at finna eitt felags útspæl, sum tey kunnu fara til landsstýrið við. Kjarnin í hesum útspælinum verður at royna at fáa eina greiða avtalu við landsstýrið um at lækka skattir og avgjøld.

Afturfyri skulu arbeiðarafeløgini lata vera við at seta so hørð lønarkrøv, sum tey annars vildu gjørt.

Tað, sum er heilt avgerandi fyri arbeiðarafeløgini er, at keypiorkan veksur. Og tað kann hon einsvæl gera við eini skattalækkeking sum við eini lønarhækking. Enn eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum ongan veg komnir við einum slíkum uppleggi til landsstýrið, men teir eru samdir at arbeiða víðari við hugskotinum fyri at vita, hvussu langt tað ber.

### Skulu vera vælkomin

At fáa eina avtalu ímillum fakfeløgini og politiska myndugleikan um lønarlag og skattatrýst er nakað, sum politikarar hava sóknast eftir í nógv ár.

Og løgmaður sigur eisini, at partarnir í arbeiðsmarknaðinum skulu vera vælkomnir í landsstýrið at umrøða støðuna.

Hann er eisini spentur at vita, hvørji ítøkilig uppskot partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava, skuldi tað komið hartil, at teir biðja um fund við landsstýrið um viðurskiftini.

– Hetta er avgjørt nakað, sum landsstýrið fer at taka væl ímóti.

Men løgmaður ásannar samstundis beinanvegin, at sum støðan er, verður tað ómetaliga trupult at fáa serliga serliga avtalu við fakfeløgini um at lækka skattin.

– Samgongan hevur longu bundið seg til at lækka skattin tilsamans 240 milliónir í hesum valskeiðnum. Hendan skattalætta standa vit við, so vit meta avgjørt, at vit hava nógv at tosa við arbeiðarafeløgini um og at vit hava nógv at greiða teimum frá.

– Men vit vita eisini, at fíggjarlógini hevur stórt hall. Fyri at avmarka hallið, royna vit at spara alt tað, vit kunnu.

– Og tað verður ómetaliga trupult at skerja inntøkurnar hjá landskassanum meiri enn tað, uttan eisini at seta sparingar í verk fyri at skerja útreiðslurnar. Og hvar hesar serligu sparingarnar skulu gerast, dugi eg ikki at síggja við teimum ovurstóru trupulleikum, sum landskassin hevur at dragast við frammanundan, sigur løgmaður.

Sostatt sigur hann, at útyvir avtalaða skattalættan upp á 240 milliónir, verður tað ómetaliga trupult at fáa eina serliga avtalu ímillum landsstýrið og politiska myndugleikan um enn størri skattalækkingar og um at lækka almenn avgjøld.

– Hetta er ikki ein einfaldur spurningur, tí verða inntøkurnar hjá landskassanum skerdar við skattalækkingum og avgjaldslækkingum, mugu sparingar gerast. Inntøkur og útreiðslur hjá landskassanum mugu eisini lagast til hvørt annað, tí hallið á fíggjarlógini má avmarkast mest møguligt og helst skal tað heilt burtur.

### Má ikki verða ein undanførsla

Annars ásannar løgmaður, at tað høga kostnaðarstøðið er ein trupulleiki hjá vinnuni.

Men hann heldur eisini, at tað høga kostnaðarstøðið eigur heldur ikki verða ein undanførsla fyri ikki at hugsa nýtt í vinnuni.

– Spurningurin er eisini, um kappingarførið eigur at fáa skyldina fyri allar trupulleikarnar hjá vinnuni.

Hann spyr um tað er rætt at geva kappingarførinum skyldina fyri allan fiskin, sum floymir á marknaðin úr Kina. Hann spyr eisini um tað er rætt at geva kappingarførinum skyldina fyri allan fiskin, sum fer óvirkaður av landinum.

– Spurningurin er, hvat vit skulu samanbera okkum við. Tað er væl ongin, sum heldur, at vit skulu niður á skotskt ella kinesiskt lønarlag.

– Er tað hetta, sum vit skulu í holt við, er tað longu greitt, at uppgávan størri, enn vit makta.

Løgmaður heldur, at vit hinvegin eiga at leggja okkum eftir at leggja vinnuna um og at gera okkum dugnaligari til at hava vinnuna gangandi við tí kappingarføri, vit hava.

– Hóast alt hava vit stórar fyrimunir. Vit liggja mitt í fiskiríkidøminum og tað er lutfalsliga stutt á marknaðin. Málið hjá okkum má tí vera at gagnnýta teir fyrimunirnar, vit hava, til fulnar við at komið á marknaðin við spillfeskum fiski at kalla hvønn dag.

– Tað ræður um at gera vørur, sum ongin annar kann gera betri enn vit!

Løgmaður sigur, at hetta eru alt viðurskifti, sum vinnulívmenn hava umrøtt nógvar ferðir í seinastuni.

Men hann er eisini samdur í, at skal hetta bera til, verður neyðugt við betri sambandi ímillum Føroya og umheimin.

– Eitt nú hevði betri flogsamband verið ein stórur fyrimunur so at tað kundi borið til at flogið feskan fisk á marknaðin.

– Tað hava íslendingar gjørt leingi, men vit eru ikki so frægt sum byrjað.

Somuleiðis heldur hann, at betri sjóvegis samband til Skotlands hevði verið ein fyrimunur

Kortini sigur hann, at politiskt fyriliggur onki fyri at bøta um hesi viðurskiftini.

– Flogvøllurin er danskt málsøki og enn hevur ikki eydnast at fáa eina avtalu við danir um at yvirtaka hann, so enn veit løgmaður ikki, hvat hendir á tí økinum.

Men hann heldur tó, at tað eigur at verða eitt politiskt mál at gera nakað við hesi viðurskiftini.

# Flutti 2.500 fólk á jóansøku

**Ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina hevur ongantíð verið so gott á nakrari jóansøku, sum hesuferð**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Ongantíð áður á jóansøku hevur ferðasambandið ímillum Havnina og Suðuroynna verið so gott sum hesuferð, sigur Andrass Jensen, ferðafólkaleiðari*

Rættiliga nógv fólk úr miðstað vóru á jóansøku í Vági seinasta vikuskifti.

Strandferðslan hevur gjørt tølini upp fyri, hvussu nógv ferðafólk vóru við Smyrli seinasta vikuskifti.

Og tølini vísa, at hósdagin, fríggjadagin og leygardagin flutti Smyril heili 2.500 fólk úr Havnini, til Suðuroyar.

Hesar somu dagarnar vóru 382 persónbilar suður við Smyrli.

Í Suðuroy búgva 5.000 fólk, so á jóansøku vaks fólkatalið eini 50%.

Hósdagin vóru 406 fólk og 93 bilar suður. Fríggjadagin vóru 1300 fólk suður við smyrli og 265 bilar og leygardagin vóru 660 fólk suður og 24 bilar. Men leygardagin var hann fullur av kappróðrarbátum.

### Fleiri túrar

Hesa jóansøkuna hevði Strandferðslan annars lagt á annan bógv við tað, at siglt varð munandi meiri enn undanfarin ár.

Á jóansøku undanfarnu ár hava trupulleikar javnana tikið seg upp, tí nógv fólk hava staðið eftir, sum ikki eru sloppin við Smyrli.

Men í ár sigldi Smyril tríggjar ferðir ímillum Havnina og Suðuroynna fríggjadagin og tvær ferðir leygardagin.

– Hetta vísti seg, at rigga avbera væl, tí ongatíð áður hevur ferðafólkaflutningurin á Jóansøku gingið so væl sum í ár, sigur Andrass Jensen, ferðafólkaleiðari hjá Strandferðsluni.

Tó varð Smyril seinkaður ein tíma fríggjadagin. Men tað komst av, at suður fríggjamorgunin vóru fleiri serligir bilar við og tað gjørdi at tað gekk ikki so væl at lasta Smyril, sum ætlanin var.

– Men tað vísti seg at tað hepnaðist væl at javna flutningin. Tá ið fáir túrar eru, mestsum trokast fólk umborð. Men nú, vit sigldu fleiri túrar, gjørdi ferðafólkið tað, at tey býttu seg væl sundur ímillum teir ymsu túrarnar.

Norðuraftur hevur heldur ikki verið nakar trupulleiki, uttan tann eina túrin mánadagin, tá ið tveir bilar stóð eftir.

– Tey, sum fóru suður, vóru fyri ein part suðuroyingar, sum vórðu verandi í Suðuroy og annars fóru fólk norður aftur so hvørt, tey fyrstu fóru norður aftur leygarkvøldið, og annars fóru fólk norður aftur sunnudagin og mánadagin.

Men leygardagin, sunnudagin og mánadagin fóru 2100 fólk norður við Smyrli og 298 persónbilar.

Andrass Jensen sigur, at av tí, at ferðafólkið varð býtt sundur ímillum fleiri túrar, far tað eisini róligari og friðaligari umborð, enn tað mangan hevur verið á jóansøku.

– Tá ið túrarnir hava verið fáir, eru fólk mestsum løgtst á skipið fyri at sleppa við og tað hevur elvt til trupulleikar, bæði hjá manning og ferðafólki. Men tað sluppu vit undan hesuferð, sigur ferðafólkaleiðarin hjá Strandferðsluni.

Leygardagin vóru eisini serlig vaktarfólk við Smyrli at tryggja friðin umborð.

# "Nýggj" sparikassadeild í Saltangará

**– Umskipingin leggur upp til, at viðskiftafólk skulu kenna seg vælkomnan í deildini, bæði til smá ørindir, og tá ið tú hevur meira uppá hjartað og hevur tørv á hollari fíggjarligari ráðgeving. Málið er at taka burtur forðingar, sum kunnu vera millum viðskiftafólk og ráðgeva og soleiðis skapa møguleikar fyri eini lættari og fríari atgongd, siga tey á deildini í Saltangará**

UMSKIPING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jónleif Th. Jacobsen, økisleiðari, Kristina Ellingsgaard, varaleiðari og Frithleif Olsen, nevndarformaður í Føroya Sparikassa*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hósdagurin, 1. juli, er settur sum nýggjur upplatingardagur hjá deildini hjá Føroya Sparikassa í Saltangará. Hetta merkir tó ikki, at deildin hevur verið afturlatin og er latin uppaftur. Men seinastu tíðina eru hølini, sum annars eru tey somu sum frammanundan, vorðin umskipað og innrættað av nýggjum.

Hølini eru nú opnari og litirnir frískari. Innbúgvið er broytt, soleiðis at diskar, kassar og annað eru færri. Sum viðskiftafólk, ið leitar eftir ráðgeving, situr tú ikki yvir av ráðgevanum, sum er krógvaður aftanfyri telduskíggjar og skuffur.

### Lættari atgongd

Jónleif Jacobsen, økisleiðari, sigur, at málið við nýggju innrættingini er at taka burtur forðingar, sum kunnu vera millum viðskiftafólk og ráðgeva og soleiðis skapa møguleikar fyri eini lættari og fríari atgongd hjá viðskiftafólki til tey, sum starvast á deildini.

– Hevur tú eitt hvørt at tosa við okkum um, nýtist tær ikki at stilla teg við kassan at bíða. Skjótast og lættast er at venda sær beinleiðis til ein ráðgeva, sum er fúsur at hjálpa tær við øllum spurningum og ørindum.

Í deild sparikassans í Saltangará stendur ein einstakur kassi eftir, har tú kanst avgreiða inngjøld og útgjøld í reiðum peningi. Sjálvtøka er eisini til pengingaavgreiðslur.

– Broytingin merkir, at vit eru farin frá tveimum kassaavgreiðslum til ein kassa. Í staðin hava vit nú níggju avgreiðslur, har ráðgevar veita hjálp og góð ráð í fíggjarligum spurningum. Heldur enn at hava samband við ein kassa, fært tú í nýggju skipanini samband við ein kundaráðgeva.

### Arbeiða í bólki

Jónleif sigur, at umskipingin leggur upp til, at viðskiftafólk skulu kenna seg vælkomnan í deildini í Saltangará, bæði til smá ørindir, og tá ið tú hevur meira uppá hjartað og hevur tørv á hollari fíggjarligari ráðgeving.

Ráðgevingin í deildini í Saltangará er annars skipað soleiðis, at kundaráðgevarnir arbeiða í bólkum, og tað metir deildin hevur stórar fyrimunir fyri teg sum viðskiftafólk.

– Tú hevur tín egna kundaráðgeva, men um ráðgevin av eini ella aðrari orsøk ikki er at hitta, ber bólkaskipanin í sær, at hinir ráðgevarnir á deildini kunnu veita tær líka holl ráð ella hjálp. Bólkaskipanin ber nevniliga í sær, at ráðgevarnir kenna tíni viðurskifti við Sparikassan. Soleiðis kemur tú sum viðskiftafólk við tíðini at heilsa uppá allar ráðgevarnar í bólkinum, og á henda hátt verður tað altíð onkur á deildini, tú kennur – og, sum kennur teg sum viðskiftafólk, sigur økisleiðarin.

### Børnini við

Børn keða seg ofta, tá ið tey bíða eftir foreldrunum, sum avgreiða síni ørindi í peningastovni.

Hetta hava tey á deildini í Saltangará eisini hugsað um.

Kristina Ellingsgaard, varaleiðari, sigur, at fólk kunnu saktans hava børnini við tær inn í Sparikassan í Saltangará.

– Miðskeiðis í hølunum kunnu børnini eitt nú lesa bøkur, tekna og hyggja at filmi, meðan foreldrini avgreiða tey "keðiligu" ørindini. Eru tú og kundaráðgevin í trúnaðarpráti, hava vit eyguni eftir barninum, sigur varaleiðarin, ið er væl nøgd við umskipingina, sum hon vónar fer at vera til gagns fyri viðskiftafólkini.



*Málið við nýggju innrættingini er at taka burtur forðingar, sum kunnu vera millum viðskiftafólk og ráðgeva og soleiðis skapa møguleikar fyri eini lættari og fríari atgongd hjá viðskiftafólki til tey, sum starvast á deildini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Vælumtókt føroyakvøld í Eysturoy

**Í summar verður aftur skipað fyri føroyakvøldum í Eysturoy, og komandi mikukvøld verður føroyakvøld í róðrarneystinum á Glyvrum**

FØROYAKVØLD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Vælumtóktu føroyakvøldini í Eysturoy eru ætlað bæði útlendingum og føroyingum*

Ferðavinnan í Eysturoy hevur nú tikið uppaftur tey vælumtóktu føroyakvøldini, har borðreitt verður við føroyskum viðskera og ymiskum undirhaldi.

Tvey slík kvøld hava longu verið í skótamiðdeplinum á Selatrað. Kvøldini eru ætlaði bæði útlendingum og føroyingum, og fólk lata væl at og eru fegin um hesi tiltøk.

### Á Glyvrum

Nú er so tíðin komin til, at eitt føroyakvøld aftur verður í róðrarneystinum á Glyvrum.

Kunningarstovan í Saltangará veit at siga, at hetta kvøldið verður mikukvøldið, 7. juli, og lagt verður fyri klokkan 18.30.

Á skránni verður fjølbroytt úrval av føroyskum mati, og haraftrat verður ymiskt undirhald á skránni, eitt nú upplestur um føroyska samfelagið, um søgu og mentan. Eisini verður vístur filmur um Føroyar, og framsýning verður av pløggum, sum eru virkað í Føroyum.

### Royna stev

Føroyakvøldið á Glyvrum endar við dansiframførslu, har gestirnir eisini sleppa at royna stev, sum tikið verður til.

Atgongumerkir til kvøldið í kappróðrarneystinum á Glyvrum kunnu bíleggjast á Kunningarstovunum í Fuglafirði og í Saltangará og Hotel Runavík, Sjómansheiminum.

# Bjóða ikki uppá alment útboðin arbeiði

**– Vit eru bidnir um at geva tilboð uppá nøkur arbeiðir, og tað hava vit gjørt, men vit fara ikki í kapping við aðrar at bjóða uppá arbeiði, sum verða boðin út alment, sigur Jan Danielsen, stjóri hjá P/F Klement Petersen**

BJÓÐA IKKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuni høvdu vit grein um ein part av virkseminum hjá fyritøkuni, P/F Klement Petersen í Saltangará, sum eitt nú hevur bygt fleiri bygningar fyri kommunur.

Fyritøkan, sum hevur eitt rættiliga stórt vøruúrval av eitt nú byggitilfari og hvítvørum, er veitari til fleiri arbeiðstakarar.

Nú P/F Klement Petersen hevur bygt fleiri almennar bygningar, eru viðskiftafólk hjá fyritøkuni farin at fregnast eftir, um fyritøkan fer at taka upp kappingina um útbjóðingar á jøvnum føti við aðrar fyritøkur.

– Nei, tað fara vit ikki, sigur stjórin, Jan Danielsen.

Hann vísir á, at P/F Klement Petersen bjóðar ikki og fer ikki at bjóða uppá arbeiði, sum verða alment útboðin.

– Vit eru bidnir um at geva tilboð uppá nøkur arbeiðir, og tað hava vit gjørt, men vit fara ikki í kapping við aðrar at bjóða uppá arbeiði, sum verða boðin út alment, sigur Jan Danielsen, stjóri hjá P/F Klement Petersen.